# ítróttur

Nr. 38 • mikudagur • 25. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ulrik Wilbek áhugaður í Sveini

**Mest vinnandi danski landsliðsvenjarin í hondbólti nakrantíð, Ulrik Wilbek, ið nú venur mansliðið hjá Viborg, hevur víst unga Sveini Justinussen úr StÍF áhuga**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í nítiárunum vann danska kvinnulandsliðið í hondbólti bæði OL, HM og EM undir leiðslu av Ulrik Wilbek. Nú er kendi danin venjari hjá mansliðnum hjá Viborg HK, ið til dagligt leikar í næstbestu donsku deildini. Viborg HK er kent sum eitt felag, ið strembar høgt, og í løtuni liggur liðið á odda í næstbestu deildini.



Í hópinum hjá Viborg er m.a. strikuspælarin á danska landsliðnum, Michael V. Knudsen, ið herfyri bleiv kosin besti strikuspælarin í EM-endaspælinum, har danir vunnu bronsu. Ein annar kendur leikari í felagnum, er vongurin Nikolai Jacobsen, ið herfyri vendi aftur til Danmarkar eftir at hava leikt fleiri ár í týska stórfelagnum THW Kiel.

### Sveinur visti av ongum

Sosialurin hevur frá fólki í Hondbóltsambandi Føroya fingið at vita, at Ulrik Wilbek herfyri bað um at fáa videoupptøkur av Sveini, um tað var gjørligt. HSF hevur tískil sent eitt band av landsdystinum millum Føroyar og Noreg á Hálsi tann 10 januar, har Sveinur av álvara gjørdi um seg.

Tá ið vit ringdu til Svein mánadagin fyri at vita, hvat hann helt um áhugan frá Ulrik Wilbek, gjørdist Sveinur kløkkur, tí hann visti av ongum. – Hatta veit eg einki um, men tá tú hevur tað frá HSF, so má tað passa, sigur Sveinur Justinussen. Sjálvandi er tað spennandi, og at Ulrik Wilbek er venjari, ger tað ikki minni spennandi, sigur ungi hondbóltsleikarin. Í løtuni gongur Sveinur Justinussen í studentaskúla á Kambsdali, og gongur alt eftir ætlan kemur húgvan á høvdiuð í summar. Sveinur hevur áður sagt við fjølmiðlarnar, at hann ongan veg fer, áðrenn skúlin er liðugur, men at hann er áhugaður í at fara til Danmarkar at royna seg. Sveinur sigur, at fær hann eina innbjóðing frá Viborg til eina royndarvenjing, so fer hann avstað, um tað liggur fyri, tí tað er ein stór avbjóðing at fáa.

*Ungi Sveinur Justinussen fer nú møguliga at royna seg í donskum hondbólti*

# Mikkjal Thomassen á B68-miðvøllin

**Fyrrverandi landsliðsleikarin skal verða nýggi miðvallarmotorurin á Svangaskarði**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

B68 misti sum kunnugt í vetur stóran part av miðvøllinum, tá bæði Jann Ingi Petersen og Fróði Benjaminsen gjørdu av at royna fótbóltseydnuna uttanlands.

Eisini í aðrar mátar hevur talan verið um frágongd hjá toftamonnunum, men nú røkist tó fyri, at leiðslan í felagnum er í ferð við at tippa nøkur av holunum aftur.

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at felagið hevur gjørt avtalu við Herbert í Lon Jacobsen fyri komandi kappingarár, og nú stendur so greitt, at hesin ikki verður einasti løgreglumaðurin í felagnum.

Toftamenn hava nevnliga eisini gjørt avtalu við Mikkjal Thomassen – sum saman við Herbert hevur nomið sær útbúgving innan løgregluna.



*Mikkjal Thomassen, h.m. fer nú at styrkja um miðvøllin  hjá B68*

Mikkjal leikti fram til 1996 við HB, og eisini var hann eitt skifti í landsliðshópinum hjá Allani Simonsen. Men tá hann ikki vildi gjalda eina bót fyri at koma ov seint aftur frá einum innkeypstúri á eini uttanlandsferð, varð hann settur í karantenu av táverandi landsliðsvenjaranum.

Eftir at hava havt steðg frá fótbóltinum í eitt ár, fór Mikkjal í 1998 at royna seg hjá B36, og eisini har vann hann sær mest sum alt fyri eitt fast pláss á miðvøllinum.

Og tað er einki at ivast í, at tey á Toftum vænta sær nógv av nýggja miðvallaranum. Hóast hann ikki er av skjótastu monnum, so er talan um ein gjøgnumbrotssterkan leikara, sum vanliga er góður fyri nøkur mál um árið. Spælskilið er eisini av tí besta, umframt at hann kropsliga er sera væl fyri, so tað tykist upplagt, at B68 við hesum hevur funnið sær ein nýggjan miðvallarmotor fyri Fróða.





# Klaksvíkar Billardfelag á odda í báðum deildum

BILLARD
*Tíðindaskriv*

Klaksvíkar Billardfelag liggur á odda í báðum deildunum í føroyameistarakappingini í billard fyri lið. Hóast 1. Deildarliðið hjá felagnum hevur eina kapping millum enn flestu av hinum liðunum, so liggur tað kortini klárt á odda við 78 stigum. Næst er Kaggin 1 við 64 stigum. Síðani kemur Havnar Klubbi og í botninum liggja Kaggin 2 og Tvøroyrar Billardfelag. Kaggin 2 vitjaði í Klaksvik herfyri og var fyri stórtapi. Vertirnir spældu til sítt besta og vunnu 16-2. Krisjan Sune Høgnesen var aftur hesaferð bestur av spælarunum. Havnar Klubbi var á vitjan í Kagganum. Har endaði dysturin við sigri til Kaggan, 12-6. Henrik Petersen og Bjarni Skaalum stóðu seg best.

Í 2. deild er støðan tann, at Klaksvíkar Billardfelag eisini liggur á odda. Niðast er Tvøroyrar Billardfelag. Hesi bæði liðini spældu herfyri og vunnu klaksvíkingar við 14-4. Besti spælari var Óli Biskupstøð við 6 stigum. Bestu hjá tvøramonnum var Rókur Dimon við 4 stigum.

Tað eru trý umfør eftir at leika í vetur. Kappingin endar 26. mars bæði í 1. og 2. deild. Eftir tað verður so innleiðandi umfar til einstaklingakappingina og seinni finalan.



### Støður

**1. deild**

| | Dystir | Eygu | Miðal | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Billardfelag | 5 | 22366 | 24,85 | 78 |
| 2 Kaggin 1 | 6 | 20676 | 19,14 | 64 |
| 3 Havnar Klubbi | 6 | 21236 | 19,66 | 50 |
| 4 Kaggin 2 | 6 | 17394 | 16,11 | 32 |
| 5 Tvøroyrar Billardfelag | 5 | 13140 | 14,60 | 28 |

**2. deild**

| | Dystir | Eygu | Miðal | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Billardfelag 2 | 6 | 11344 | 10,50 | 80 |
| 2 Klaksvíkar Billardfelag 1 | 6 | 10752 | 9,96 | 62 |
| 3 Havnar Klubbi | 5 | 8378 | 9,31 | 57 |
| 4 Kaggin | 6 | 9128 | 8,45 | 45 |
| 5 Tvøroyrar Billardfelag | 5 | 4536 | 5,04 | 8 |

# FM Semifinala í Bridge

**Finnast skal nú fram til leikararnar, sum skulu hava umboð í FM-finaluni í kappingini fyri pør**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

FBS skipar aftur í ár fyri sera væl dámdu kappingini, FM fyri pør í Bridge. Byrjað verður leygardagin 28. februar 2004 kl: 10:00. Spæld verður í Bridgehúsinum í Havn.Tey fremstu pørini koma so víðari til finaluna, sum eisini verður leikt í Bridgehúsinum í Havn tann 27. mars kl. 10:00.

Semifinalan verður leikt uppá eini 50 til 60 spøl og spælt verður til uml kl. 18:00. Luttøkugjaldið er kr. 200.- fyri hvønn, íroknað døgurði, kaffi, køkur og náttura.

Møguleiki er hjá suðringum og norðingum at verða við í kappingini og sleppa heim aftur um kvøldið.

Tilmelding á tlf. 22 15 94, á e-mail adressu j ella í Bridgehúsinum í Havn innan fríggjakvøldið 27. februar kl. 21:00.

### Spæl

Hetta spælið er frá einum landsdysti millum Føroyar og Danmark og gjørdi tað at danir vunnu dystin tepurt.

Eg sat norðan við hesari hondini og skuldi byrja meldingarnar:

| | |
|---|---|
| SP | K1032 |
| H | EK109865 |
| RU | K2 |
| KL | E |

Eg valdi at opna 1hj, makkarin svarar 1sp. Hvat skal ein so melda? 4sp er eftir mínum tykki heldur veikt. 4kl sum splinter er heldur ikki gott, tí sjálvt um makkarin meldar 4sp, hava vit hug at royna eftir slemminum. Eg valdi tískil beinleiðis at spyrja eftir essum við at melda 4ut. Makkarin svarar 5sp, sum lovar tvey ess og trumf damu. Eg meldaði so tann upplagda 7sp, helt eg, men vestan doblaði fyri at fáa hjartara útspæl, tí hann hevði ongan hjartara og við at fáa makkarin hjá sær, at spæla hjartara út kundi vestan seta 7sp. Símin meldaði nú flott 7ut, men hesin kundi heldur ikki vinna. Við hitt borðið sat eitt danskt par, ið spældi við einum kunstigum relesystemi og tískil kom 7sp at sita hjá sunnan. Sostatt skuldi vestur sjálvur spæla út. Eitt sindur heppið hjá dønum, ið vunnu eini 19 imp uppá spælið.



*Bjarki Johannesen og Eliesar Olsen vunnu simultan-kappingina herfyri. Teir eru ivaleyst eitt gott boð um ein av finalusessunum*